## FISKIVINNUTÍÐINDI

## Fiskamarknaður økir um veiðutrýstið

Ein marknaður, sum skal syrgja fyri at selja óbrúyktar fiskidagar, hesin kemur at økja um veiðutrýstið á føroysku grunnunum. Hetta segði Bjarti Mohr við útvarpið í dag.

– Við eini slíkari skipan fara ósjónligir fiskidagar at gerast sjónligir og harvið verður veiðutrýstið økt, segði Bjari Mohr, sum er reiðari á fleiri trolarum,

## Fiskiskapurin at kalla óbrýttur

Sambært hagtølunum frá Hagstovuni so er fiskiskapurin tveir teir fyrstu mánaðarnar í ár at kalla óbroyttir í mun til í fjør. 36 pronsent av veiðuni undir Føroyum tveir teir fyrstu mánaðarnar í ár var upsi, 23 prosent toskur, 14 prosent hýsa og sjey prosent kongafiskur og blálonga. Hetta er næstan tað sama sum í fjør, tá veiddu vit eitt sindur minni af upsa og toski og eitt sindur meira av hýsu.

## Nýggjur fundur um Norðsjóðartoskin

Í morgin verður farið undir triðja umfar í samráðingunum millum Noreg og ES um toskastovnin í Norðsjónum. Um fimm dagar verða toskaleiðirnar í Norðsjónum latnar upp aftur og tá skal helst vera funnin ein semja millum ES og Noregi um komandi toskaveiðuna.

Toskastovnurin í Norðsjónum er sera illa fyri og roknað verður við, at tað er ikki nóg mikið at steingja toskaleiðir. Neyðugt verður eisini við øðrum tekniskum tiltøkun, eitt nú størri meskavídd og skiljirist í trolini.

## 17,205 tons av feskfiski landað

Tveir teir fyrstu mánaðarnar í ár komu 17,205 tons av feskum fiski á land í Føroyum. Og verður hugt eftir hvussu hesin fiskur er veiddur, so hevði verið svangligt í Føroyum, høvdu vit bert húkin at dúva uppá Lemmatrolararnir og partrolararnir veiddu góð 11.000 tons av teimum 17.205 tonsunum, sum koma upp á land í januar og februar. Línan stóð fyri góðum 5000 tonsum og snellan 454 tons. Garnabátarnir, tað eru teir sum royna eftir svartkalva og havtasku á djúpum vatni veiddu 600 tons tveir teir fyrstu mánaðarnar í ár, upplýsir Hagstovan.

## Høgur toskaprísur

Prísurin á toski yvir 7 kg fóru ungantíð niður um 28 krónur fyri kiloið í januar og februar í ár. Toskur 4ø7 kg lá á 26 krónur fyri kiloið og 2-4 kg á 22 krónum og tú skuldi heilt niður til smáfisk 1-2 kilo fyri at koma niður um 20 krónur. Her var miðalprísurin fyri báðar mánaðarnar kr. 13,52. upplýsir Hagstovan

Hýsan lá eisin ógvuliga støðug úr kr. 15,58 og niður í kr 14,85. Í januar var toskaprísurin einstakar dagar hægri enn havtaskuprísurin.

## Frysta nebbasild til íslendingar

íslendska fyritøkan Dimon ehf hevur umbiðið 200 tons av nebbasild, sum skulu frystast í Norgei til íslendskar línubátar. Nebbasildin er spillfeks, hon verður fryst í seinasta lagi 15 timar eftir at fiskurin er komin á dekkið.

Íslendingar nýta eini 1500 tons av nebbasild um árið til agn, serliga tá teir royna eftir hýsu, skrivar íslendska vevsíðan interseafood.com

## Tyrlan serútgjørd til vaktarhald

Nýggja tyrlan hjá Atlantic Airwys, sum kom til landið í gjár er serútgjørd til vaktarhald á føroyskum sjóøki og til bjargingaruppgávur. Hon flýgur munandi skjótari enn gamla tyrlan og hevur eisini sterkari maskinur. Ein fittur partur av virkseminum verður at røkja uppgávur fyri Vaktar og Bjargingartænastuna og fyri hetta er ein langtíðarsáttmáli skrivaður, sum er við til at fíggja meginpartin av tyrluni, ið kostar 60 milliónir krónur.

# Gera tyrlupláss á flogvøllinum

**Støðupláss til fýra tyrlur verða nú gjørd á flogvøllinum í Vágum. Arbeiðið verður væntandi liðugt í næsta mánaða**

FLOGVALLAR-ÚTBYGGING

*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Støðupláss til tyrlur verður gjørt á flogvøllinum í løtuni. Arbeiðið fer at kosta eina lítla millión krónur og verður liðugt beint eftir hálvan mai.

Tað verður grivið út á flogvøllinum i løtuni. Á økinum millum lendingarbreytina og bygningarnar, á leið miðskeiðis millum terminalin og hangarin, eru gravkýr og lastbilar til arbeiðis. Har verður grivið út og gjørt klárt til tyrlupallar, sum hava manglað á flogvøllinum, sigur Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri.

Hann sigur, at tað er gamalt mál, sum loyst verður nú. Men hann ásannar, at at komandi oljuleitingini við tilsvarandi øktari tyrluferðslu hevur skundað undir, at pallarnir verða gjørdir nú. Annars er talan um pallar til allar tyrlur, sum koma og fara um flogvøllin, sigur hann.

Talan er um eitt 5.000 fermetra vítt øki, sum gjørt verður til tyrlupallar. Har verður pláss fyri fýra tyrlum, tá tað er liðugt, sigur Finnbogi Niclasen. Og tað eru ongar avmarkingar ,sum eitt nú støðd á tyrlum ella nakað tílíkt, sigur hann. Allar tyrlur, sum vit kenna í dag, kunnu uttan nakað brúka pallaranar, sigur flogvallarstjórin.

Tað hava nú mest verið tyrlurnar hjá Atlantic Airways og donsku sjóverjuni, sum hava brúkt pallin regluliga. Tær húsaast eisini dagliga á flogvøllinum.

Atlantic Airways heldur til í stóra hangarinum á flogvøllinum, meðan sjóverjutyrlan heldur til í minna, bláa hangarinum aftan fyri, sigur Finnbogi Niclasen.

Tað er í grundini ikki nakað nýtt, at støðupláss til tyrlur verður gjørt beint har, arbeitt verður nú. Har hevur verið slíkt pláss fyrr, men bara nógv minni enn tað, sum nú verður gjørt.

Um annað arbeiði, sum gerast skal á flogvøllinum, sigur Finnbogi Niclasen, at umleið ta tíðina, tá støðuplássini verða liðug, er ætlanin at fara at tosa við Landsverkførðingin um parkeringspláss til bilar,. Hesi skulu gerast oman fyri terminalin fram við landsvegnum til Sørvágs. Tann tørvurin fer væntandi at vaksa heilt munandi, tá koyrandi verður undir Vestmannasundi.

Men annars er einki meira at frætta frá nakrari útbygging av sjálvum flogvøllinum, sigur Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri.



*Mynd: Edvard Joensen*